# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Vil hava 10.000.000 í endurgjaldi

**Michael Rasmussen hevur stevnt Rabobank eftir endurgjaldin fyri inntøkumissin, sum uppsøgnin hevur ført við sær**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Árins útgáva av Tour de France gjørdist ein gøla av teimum heilt stóru. Bæði tí maðurin, sum leingi súkklaði í gulum, Michael Rasmussen, varð koyrdur av sínum liði vegna doping-illgruna. Og ikki minst, tí endaligi vinnarin, Alberto Contador, eisini er komin undir illgruna fyri dopingnýtslu. Í báðum førum tó uttan at nakar teirra varð testaður positivur.



*Michael Rasmussen var neyvan komin av súkklu sínari eftir seinasta etapusigurin, áðrenn fjølmiðlarnir vóru á kroppinum við spurningum um uppsøgnina frá Rabobank*

*Mynd: Polfoto/AP*

### Stevnt Rabobank

Danin, sum móti endanum av kappingini varð tveittur av liði sínum, hevur síðani stevnd fyrrverandi arbeiðsgevara sínum, hollendska Rabobank. Hevði Rasmussen súkklað til Paris í gulum, vildi hann her og nú forvunnið á leið 10 milliónir krónur í premium, bonusskipanin og sponsor-pengum. Hartil skal roknast við, at hann uttan iva hevði havt sera góð kort á hondini, tá samráðast skuldi um nýggjan sáttmála.

Tí hevur Rasmussen gjørt av, at stevna Rabobank, men sjálvur metir Rasmussen ikki, at málið nakran tíð finnur veg fram til rættin.

Eg rokni ikki við, at talan verður um rættarmál. Eg meti tað meira sannlíkt, at báðir partar ynskja at loysa málið í friði og náðum, og at vit tí finna eina semju, áðrenn tað kemur somikið langt, sigur Rasmussen við danska TV2.

### Kenslurnar telja ikki við

Hóast hann soleiðis hevur í hyggju at skora fíggjarliga partin, sum hann misti í farnu viku, so staðfestir Michael Rasmussen, at hann ongan tíð kann fáa endurgjald fyri sálarliga kostnaðin av hendingini.

Eg varð tikin úr kappingini, tá eg var vísur í, at eg hevði vunnið. Og tann kenslan er nakað, sum eg ongan tíð fái endurgjald fyri, sigur hann.

Og lítil ivi er um, at Rasmussen kundi vunnið. Á seinastu fjallaetapuni í Pyreneunum trampaði hann undan Contador móti seinasta fjallatindinum, og við hesum vann hann sær eina leiðslu, ið nærum ikki kundi missast aftur. Í bussinum fekk hann tó at vita, at leiðslan í felagnum ætlaði at taka hann úr kappingini, og so hjálpti tað annars lítið, at súkklarin sjálvur helt, at hetta ikki var rætt.

# Svimja um Nólsoyarfjørð

**Tíggjunda árið á rað verður skipað fyri stuðulssvimjing til frama fyri svimjihyl í Nólsoy**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Svimjingin um Nólsoyarfjørð hevur í nógv ár verið á ovastevnu, sum er annað vikuskiftið eftir ólavsøku. Og soleiðis verður aftur í ár.

Talan er um tveir teinar, sum kunnu svimjast. Vanliga teinin, har byrjað verður niðan fyri hjá radioamatørunum, og er tann teinurin 4.000 metrar. Hin teinurin er 1.000 metrar, og tá verður byrjað úr báti, sum liggur út fyri Nólsoyar bygd.

Fyri at fáa alt at ganga sum best og at tryggja, at trygdin er í lagi, møtast øll hjá radioamatørunum kl. 14.30. har kunnað verður um tiltakið og aðrar fráboðanir, ið skulu til, verða givnar.

Klokkan 15.30 leypa tey, ið svimja 4.000 metrar, á bláman yviri við Strond við Stóradam, niðanfyri hjá radioamatørunum. Tey, ið svimja 1.000 metrar, fara samstundis í bátarnar og sigla til startmálið, har tey byrja svimjingina uml. kl 16.30.

Málið hjá báðum bólkum er Heiðursportrið niðri á keiuni í Nolsoy. Um svimjari kemur á land aðrastaðni, er neyðugt at renna seinasta teinin. Samarittar eru við á ferðini um fjørðin, at ansa eftir og nólsoyingar taka ímóti og hjálpa svimjarunum tá komið er upp á land.

# Eidur Smári hugsar um West Ham

**Íslendsku eigararnir av West Ham sigast hava áhuga í at keypa størsta íslendska fótbóltsnavnið. Og tosið verður ikki avvíst av spælaranum sjálvum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinasta árið hevur Eidur Smári Gudjohnssen spælt fótbólt í Barcelona. Men har hevur tó verið alt annað enn lætt at vinna sær fasta spælitíð. Og við keypinum av Henry verður tann uppgávan neyvan lættari í ár.

Og við íslendskum eigarum í West Ham var skjótt, at tosað varð um, at eitt felagsskifti stóð fyri framman. Eitt skifti, sum ikki verður avvíst av pápa Eidur, Arnór, sum sjálvur var ein av stinnastu spælarunum, sum íslendingar nakran tíð hava átt.

Eidur er skaddur í løtuni, og fyrst og fremst ræður um hjá honum at koma fyri seg. Men hann umhugsar sjálvandi allar møguleikar, sum hann hevur, sigur Arnór við enska SkySport.

Eg havi hoyrt um áhugan frá West Ham, men har hava so ikki verið nakrar samráðingar enn. Men tað er heilt víst nakað, sum Eidur vildi hugsað um, nú talan er um íslendskan eigaraskap í felagnum, sigur Arnór, sum eisini er umboðsmaður hjá soninum.

### Vilja ikki selja

Um talan verður um nakran handil, fer tíðin so at vísa. Men í løtuni er støðan so tann, at Barcelona hevur lítlan hug at selja 28 ára gamla áleyparan.

Teir hava sagt, at tað fyrst og fremst er upp til Eidur sjálvan, hvat hann ynskir at gera. Og teir vilja sum so ikki forða honum, um hann ynskir at sleppa úr felagnum. Men teir siga eisini, at teir eru fegnir um at hava hann í felagnum, sigur Arnór, sum eisini leggur dent á, at hvørki hann ella sonurin hava stórvegis skund við at leggja framtíðina til rættis.